


## Kunngerð um afturlatingartíðir og vaktarhald hjá SEV um jólini og ársskiftið

Gjørt verður kunnugt, at allar skrivstovurnar hjá SEV eru stongdar yrkadagarnar millum jóla og nýggjár, og at øll linjuarbeiðir, skrivstovuarbeiðir og annað, sum tolir at bíða, verður steðgað í sama tíðarskeiði.

Vit hava vakt alt døgnið. Til ber at fáa fatur á vaktini á tlf. nr. 346800 í nevnda tíðarskeiði.

Vaktin tekur sær bert av viðurskiftum, sum ikki tola at bíða, sum t.d. streymslit.

Tórshavn, tann 22. desember 2005.

Elfelagið SEV

# Landsfundur

Landsfundurin hjá Føroya Fiskimannafelag verður í Norðurlandahúsinum tann 29. desember. Byrjað verður kl. 10.00 og hidið verður á út á seinnapartin.

Skráin verður tann vanliga fyri landsfundin, fyrst og fremst ársfrágreiðing, roknskapur og ásetan av limagjaldi.

Gestarøðari verður Petur Steingrund, fiskifrøðingur á Fiskirannsóknarstovuni. Fiskifrøði er eitt evni, sum er av stórum áhuga hjá fiskimonum, so vit vóna at menn fara at møta upp og nýta møguleikan at lurta og at seta spurningar á røttum stað. Hetta kann eisini gagna fiskifrøðingum í teirra arbeiði.

Teir, sum hava útreiðslur av luttøkuni, fáa tær endurgoldnar.

Føroya Fiskimannafelag

## Elektrikari

**Elektrikari søkist til áhugavert el-arbeiði. Tú má kunna arbeiða sjálvstøðugt. Góð kor til rætta fólkið.**

Skrivlig umsókn at senda til.

elmek
Gripsvegur 18.
100 Tórshavn
tlf: 317352

# Til sølu

Hvítur Toyota Corolla 1.3i, árg. '98. Sýnaður í juni '05. Fekk ongan kross! Gott anlegg fylgir við.

**Tlf. 424600 ella 509159**

**Toll- og Skattstova Føroya**
**Stýrið**

# Fyribilsskattaskráin 2006 Fríir ágóðar

Leiðbeinandi virðini fyri 2006 eru hesi:

| | | | |
|---|---|---|---|
| **a.** | **Virðið á fríum bústaði, sí viðmerking** | kr./m² | 551 |
| **b.** | **Eginnýtsla: sí viðmerking** | | |
| | el | kr. | 7.800 |
| | olju | kr. | 19.300 |
| | fastnettelefon/fartelefon | kr. | 5.000 |
| **c.** | **Frí vørunýtsla: sí viðmerking** | | |
| | Bakarar | kr. | 4.200 |
| | Bakarar við keypmansvørum | kr. | 11.300 |
| | Keypmenn | kr. | 13.700 |
| **d.** | **Virðið á fríum kosti pr. dag, sí viðmerking** | | |
| | 3 máltíðir | kr. | 50 |
| | 2 máltíðir | kr. | 38 |
| | 1 máltíð | kr. | 28 |
| **e.** | **Virðið á fríum bili (persónbilur/stationcar), sí viðmerking** | | |
| | 1100 kg og undir | kr. | 48.400 |
| | 1101 kg til 1300 kg | kr. | 58.900 |
| | 1301 kg til 1500 kg | kr. | 71.200 |
| | 1501 kg og meira | kr. | 83.800 |
| **f.** | **Vøruvognar av skapi og merki sum persónsvognar, sí viðmerking** | 75% av ásetta virðinum | |
| **g.** | **Allir aðrir bilar, sí viðmerking** | 50 % av ásetta virðinum | |
| **h.** | **Bussar upp til 10 persónar sum verða nýttir til hýruvognskoyring, sí viðmerking** | kr. | 16.500 |
| **i.** | **Eginnýtsla av bili hjá hýruvognsførarum** | kr. | 16.500 |

**Upphæddirnar eru íroknaðar meirvirðisgjald.**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Virði á partaeigaralánum hjá høvuðspartaeigarum: | | | 7% |
| **Aðrar upphæddir** | | | |
| Kapitalpensjónsfrádráttur | | kr. | 45.200 |
| Skattafrítøka fyri donsk lesandi | | kr. | 65.000 |

**Til a.**
Roknað verður við einari upphædd, sum er fyri bústaðarøkið, ið viðkomandi hevur ræðisrætt yvir. Kjallari og loft, sum ikki eru innrættaðið og hjallur og bilhús koma ikki undir hugtakið bústaðarøki.

**Til b, c, d, e, og f**
Privatur vinnurekandi skal skattast av virðinum á vørum og framleiðslum, sum hann tekur úr virki sínum at nýta ella at hava í húsarhaldi sínum, ella til gávur. Virðið verður roknað eftir keypsvirðinum ella framleiðsluvirðinum á hesum vørum.
Somuleiðis skal privatur vinnurekandi skattast av tí partinum av útreiðslunum, sum svarar til eginnýtsluna, t.d. bil, telefon, ljós og hita, har útreiðslurnar umfata bæði privatu og vinnuligu nýtsluna.
Meginreglan er tann, at skattgjaldarin sjálvur skal meta um, hvussu nógv er privat, og hvussu nógv er vinnulig nýtsla. Metingin skal vera við atliti til støðd á t.d. húsi og húski.

**Til g og h**
Upphæddirnar eru galdandi fyri bilar skrásettir sum persónvognar smb. § 3 í løgtingslóg. nr. 175 frá 18.12.1992 um skrásetingargjald á motorakførum.
Fyri bilar skrásettir sum vørubilar eftir § 5 í somu lóg verður virðið sett til 75% av upphæddini fyri bilar undir 1100 kg.
Fyri aðrar bilar enn teir, ið eru nevndir omanfyri, t.d. bilar skrásettir eftir § 6 og § 8 í somu lóg, verður virðið sett til 50% av upphæddini fyri bilar undir 1100 kg.
Toll- og Skattstova Føroya kann krevja avrit av skrásetingarskjalinum fyri bilin.

**á Argjum, 22. desember 2005**
**Toll- og Skattstova Føroya**
**Stýrið**